

# Við Goodyear og Atlantic Airways til Le Mans

*Føroyskir Le Mans áskoðarar, f.v. Frits Jacobsen, Fríðrikur Bláhamar og Petur Dagfinn Højgaard*

**Dagarnar 14. og 15. juni 2003 skipaði Goodyear Danmark A/S fyri einum túri til kendu Le Mans kappkoyringina í Fraklandi. Við í ferðalagnum vóru tríggir føroyingar. Le Mans koyringin varð fyrstu ferð í 1923**

KAPPKOYRING

*Magnus Gunnarsson*

Í ár eru liðin 80 ár síðan Le Mans koyringin byrjaði. Flest øll hava hoyrt um kappkoyringarnar í norðurfranska býnum Le Mans uttan at geva sær far um, hvat henda koyring snýr seg um. Upprunaliga vóru hesar koyringar fyri at testa haldbarheitina hjá teimum ymisku bilmerkjunum, men seinni bleiv Le Mans koyribreytin brúkt til kappkoyring burturav.

Dagarnar 14. og 15. juni í ár skipaði Goodyear Danmark A/S fyri einum túri til Le Mans fyri teirra norðurlendsku kundar og søluumboð. Við í hesum ferðalagi vóru eisini tríggir føroyingar. Teir vóru Frits Jacobsen frá Føroya Tele, Petur Dagfinn Højgaard frá Skipafelagnum Føroyar og Fríðrikur Bláhamar, Goodyear umboðsmaður, frá Super Dekk í Havn.

Føroyska ferðalagið fór úr Føroyum til Danmarkar fríggjadagin 13. juni. Fyrireikararnir av túrunum høvdu leigað eitt flogfar, sum skuldi flúgva úr Billund leygardagin 14. juni og beinleiðis til Le Mans. Tá føroyinganir skuldu innskriva seg á flogvøllinum í Billund, løgdu teir til merkis at á skeltinum oman fyri innskrivingardiskin stóðu nøvnini, Goodyear og Atlantic Airways. Tá teir komu út á flogvøllin stóð flogfarið hjá Atlantic Airways og bíðaði eftir teimum. Tað vísti seg at felagið, sum skipaði fyri túrinum, hevði leigað flogfarið hjá Atlantic Airways til Le Mans.

## 24 tímar út í eitt

Kappkoyringin, sum er 24 tímar út í eitt, byrjaði leygardagin kl. 16.00 og endaði dagin eftir kl 16.00. Bilarnir vórðu deildir upp í bólkar eftir motorstødd og hestakreftum. Tann bilurin sum koyrdi flestar umgangir í hesum tíðarskeiði í sínum bólki, vann kappingina. Tríggir kappkoyrarar vóru um hvønn bil. Bilarnir koyra við eini ferð upp á yvir 350 km/t. Le Mansbanin er umleið 14 kilometrar langur. Umleið 250.000 áskoðarar eru vanliga til hesar kappingar. Motorsportsáhugaði úr øllum heiminum koma til hesar kappingar. Áskoðararnir búgva á campingplássum inni á einum øki hjá Le Mans kappkoyringarbreytini.

Danir luttóku fyrstu ferð í hesum kappkoyringum í 1983, tá Jens Winther koyrdi saman við einum týskum bólki. Í 1990 vann danin John Nielsen, saman við einum breta og einum amerikanara, hesa kapping. Tom Kristensen hevur saman við øðrum vunnið hesa kapping fleiri ár á rað síðan 1997.

At vera áskoðari til eina kappkoyring sum hesa er heilt serlig uppliving, ferðin á bilunum, larmurin sum er alla tíðina og alt fólki. Nógv hava t.d. trappustigar og smá stillads fyri at koma longur upp og síggja betur. Flogfarið hjá Atlantic Airways stóð á flogvøllinum í Le Mans, meðan kappkoyringin varð. Ferðalagið varð aftur í Billund sunnukvøldið 15. juni kl. 20.00 eftir ein góðan túr í Le Mans í 30 hitastigum.

*maggi@sosialurin.fo*



*Umleið 250.000 motorsportsáhugaði úr øllum heiminum koma til kappkoyringina í Le Mans*

*Flogfarið hjá Atlantic Airways stóð á Flogvøllinum í Le Mans, meðan kappkoyringin var*





# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Leivur í Ullvøruhúsinum 80 ár



Í dag, fríggjadagin 22. august, verður Leivur Andreassen, nevndur Leivur í Ullvøruhúsinum í Havn, 80 ár. Leivur er havnarmaður, og hann er ein býarmynd. Róliga og hóvliga sæst hann ganga. Ferðin er ikki so nógv longur, men tað sæst væl, at hann hugsar og grundar, og tað er sera hugaligt at koma í prát við Leiv.

Foreldrini vóru Sanna og Hillebert Andreassen. Hann var úr Havnini, og hon var úr Nugga í Nólsoy. Børnini hjá teimum vóru Leivur og Sigrun, sum búgva í Havnini, Randi, sum býr í Keypmannahavn, og Herborg, sum búði í Havnini og sum doyði 33 ára gomul .

Í Ullvøruhúsinum seldi Sanna eitt nú tógv, og Hillebert hevði jarnsmiðju. Sigrun tók við handlinum hjá mammuni, og Leivur gekk í faðirsins fótasporum. Undir krígnum lærdi hann handverk hjá Askham, og í 1946 fór hann til Danmarkar í maskinskúla. Har leyk hann víðkað maskinmeistaraprógv og el installatør prógv. Leivur sigldi úti í verðini, sum tað plagdi at verða tikið til, okkurt skiftið. Eitt nú sigldi hann við Mærsk, og 1953-1956, tá ið tey búðu niðri, sigldi hann við DSB ferjum.

Leivur giftist 22. august í 1949 við Kirstin, sum er av Tinghúsvegnum. Foreldrini vóru Jóhanna og Jens Chr. Guttesen. Kirstin og Leivur eiga tvey børn, Mariu og Jens, sum bæði búgva í Havnini. Abbabørnini hjá Leivi eru átta og langabbabørnini tvey. Í mong ár búðu Kirstin og Leivur í Ullvøruhúsinum, men síðani í 1977 hava tey búð uppi við plantaguna – í Jústgøtu.

Leivur hevði í mong ár smiðju í Ullvøruhúsinum, umframt at hann fekst við so nógv annað – eitt nú var hann eitt skifti lærari á maskinskúlanum og avloysari á navigatiónsskúlanum. Í Ullvøruhúsinum gjørdi hann burturúr nýggjum, og har umvældi hann. Eitt nú munnu loddini og teinarnir vera óteljandi, portur og gelendarar, landgongdir og leydarar og soleiðis kundi verið hildið fram. Hann umboðaði Beldam maskinpakningar. Beldam skiltið hekk omanfyri hurðina inn á verkstaðið, og tað gjørdist líka sum búmerkið fyri smiðjuna.

Av og á hevur Leivur verið avloysari í maskinuni umborð á Smyrli, og hann hevur mangan arbeitt umborð í eitt nú Smyrli og Norrönu, meðan tey hava siglt ímillum lond.

Leivur er fittur í hondunum. Hann hevur verið og er framvegis arbeiðssamur, honum hevur altið dámt væl at veitt eina hjálpandi hond, og hann er skilagóður. Í frítíðini hevur honum dámt væl at flotið, og hann hevur lisið nógv. Tað, sum Leivur hevur lisið, hevur hann grundað yvir, og so er hann á sín sermerkta og stillføra hátt komin fram við tí í práti mann og mann ímillum. Tað hevur verið álvarsamt og skemtingarsamt alt í senn, og tað eru nógvar vendingar og orðatøk, sum tey, ið kenna 80 ára føðingardagsbarnið, minnast hann fyri at taka til aftur og aftur.

Kirstin og Leivur hava altíð havt sína regluligu gongd í Ebenezer. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum Jensi í dag frá klokkan 10 til 14.

## Leikari farin



12. juli legði Róland Waag Høgnesen frá sær sum leikari í lívsins fótbóltsdysti, eftir at hava verið evnaríkur og sjónligur leikari stóran part av ævi síni. Róland leikti á ymsum plássum, hann var góður í verjuni, men í álopsspæli sýntist hann altíð sera væl upplagdur, og varð upphav til mangt málið, bæði sum landsliðsleikari og sum leikari í donsku superliga'ini.

Nakað soleiðis kundi verið hugleitt um teg um ein nú skuldi hildið seg í fótbóltstermologi'ini, eisini eitt øki, ið tú hevði stóran áhuga fyri.

Tú vart føddur og uppvaksin í Klaksvík, næstyngstur av 4 brøðrum. Skúli og lærdómur vóru áhugaøki, ið tíðliga vóru kveikt, tí fór tú sum ungur fyrst til Havnar og sum 20 ára gamal til Keypmannahavnar at nema tær útbúgving.

Lestrarøkið var breitt, tó blivu fakini søga og religión tey tú tók útbúgving í, og har vektin av tínum lívstarvi varð løgd.

Men vit kendu teg eisini sum mannin við tí vælsignaða víða sjónarringinum.

Í nógv ár var tú miðsavnandi og sera virkin innan føroyska felagslívið í Keypmannahavn.

Á arbeiðaplássi tínum, studentaskúlanum í Hellerup var tú álitismaður og avhildin sum lærari og starvsfelagi.

Luttakari í almennum orðaskiftum um samfelagsviðurskifti her heima, men so sanniliga eisini um danskan nærpolitik ella samfelagsmál, og kundi tú tá verða bæði harðmæltur og treystur, men hóast sárur um ávísar hendingar, bar tú ikki agg (tað var bóltinum tú fór eftir og ikki leikaranum), men var léttur í lund. Humanistiska ástøði var títt kjølfesti, so tolerangsan sigraði yvir tí bansetta.

Áhugaøkini vóru so mong, fortíð, siðsøga, bókmentir og skaldskapur høvdu eisini tín serliga savnaraáhuga.

Tú vart vinsælur og ættarkærur sum fáur, og klaksvíkingur við stórum K.

75 blivu árini, og tey 55 í Danmark, men hóast fjarðstøðuna var tú altíð nærverandi og deiliga fordómsfríur í tíni luttøku á »Leikpalli Føroya«, í føroyska samfelagsorðaskiftinum, ella tú átók tær uppgávur her heima sum prógvdómari, leiðbeinari og lærari tað eina árið.

Fakliga var tú kveikjari.

Tú var altíð klárur at dugna, so hjá fleiri var tú loyali kletturin tey stiðjaðu seg til í so ymiskum viðurskiftum.

Men fyrst og fremst var tú tann familjukæri abbin, ið so javnan vitjaði okkum, og sum vit gestaðu í summar.

Nakað var tú viknaður, men tú kløkkaði okkum við so brádliga at tveita litríka leikarabúnan og klæðast hin hvíta.

Dysturin verður leiktur víðari við einum leikara minni – og tó, á fleiri økjum vóru longu nýggir leikarar settir við.

Friður verið við minninum um verfaðir

**Hans Dávid Dam**

## Andrea Joensen 25 ára starvsdag



21. august hevði Andrea Joensen í Sandavági 25 ára starvsdag í Føroya Banka. Hon byrjaði sum 17 ára gomul sum næmingur í Sjóvinnubankanum.

Andrea er 42 ára gomul, ættað og búsitandi í Sandavági.

Foreldrini eru Asta og Leivur Joensen í Sandavági. Hon er gift við Jonhard Joensen, ið er sonur og Jancy og Svabo Joensen úr Sandavági. Jonhard arbeiðir hjá Sandavágs Timburhandli, og tey eiga børnini Janu og Leivur.

Andreu dámar væl at ganga túrar í náttúruni, tað verði seg norðuri á

Oyrargjógv ella í Oknadali. Eisini dámar henni væl at arbeiða í urtagarðinum og annað handaligt arbeiði. Hon hevur ikki sama áhuga fyri ítrótti sum maðurin.

Andrea hevur øll árini arbeiddi í Sandavági, fyrst í Sjóvinnubankanum síðan í Føroya Banka, eftir at bankarnir vórðu lagdir saman.

## Dagurin

**22. august. Symphorianus,** deyður í umleið ár 180. Kristin ungur maður úr Autun í rómverska landinum Galliu (Suðurfraklandi). Varð tikin av døgum, av tí at hann ikki vildi tilbiðja skurðgudamyndir í Cybeletemplinum.